út at koyra

Alfa Romeo 147

Á altjó›a bilaframs‡n-ingini í Paris, ver›ur ein n‡ggjur Alfa Romeo 147 s‡ndur fram, i› er gjørdur til beinlei›is kapping í tí sonevnda »Golf« klassanum.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Mazda bestir

Tey stóru t‡sku motor-blø›ini »Auto Motor und Sport« og »Auto Bild«, hava roynda-rkoyrt 100.000 km. ella jør›ina runt 2,5 fer›ir, vi› fleiri bilmerkjum. Eftir at hava kanna› bil-arnar aftaná, var úrsliti› at Mazda klára›u seg best.

Kelda: Motor Magasinet

Hyundai Elantra

Ein n‡ggjur Hyundai Elantra kemur til Danmarkar í oktober. Í fyrsta umfari ver›ur talan um útgávur vi› 4 og 5 hur›um.

Kleda: Bilen Motor & Sport

N‡ggjur Renault Laguna kemur í apríl

MAGNUS GUNNARSSON

Tá altjó›a bilaframs‡ningin í Paris letur upp 30. september ver›ur ein heilt n‡ggjur Renault Laguna s‡ndur fram. Bilurin ver›ur gjørdur í tveimum útgávum, hatchback og stationcar, sum ver›a tveir ólíkir bilar.

Hatchback og stationcar

Markna›arlei›arin hjá Renault sigur, at teir hava ment tveir ymiskar bilar, sum hava hvør sína designfilosofi og eru gjørdir til hvør sínar kundar. Hatchback og stationcar útgávurnar hava stórt sæ› somu møguleikar, men stationcar útgávan sær meira elegantur út.

Naka› d‡rari

N‡ggi Laguna kemur á danska markna›in í apríl 2001. Ongin prísur er ásettur enn, men talan er um ein størri bil, sum eisini ver›ur naka› d‡rari.

Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S

A1 - komandi lættvektari frá Audi

MAGNUS GUNNARSSON

Audi arbei›ir vi› ætlanum um at gera ein A1, sum skal byggjast yvir ein felags Audi / VW plattform. Vi› at n‡ta n‡ggjastu konstruktiónstøknina, ver›ur rokna› vi›, at fáa vektina ni›ur á 800 kg., uttan at brúka aluminium. Kabinan ver›ur heilt nútímans, vi› m.a. at baksetrini kunnu gerast um til eitt slætt gólv, uttan at taka tey út. Prísurin ver›ur eitt sta› millum Polo og Golf.

Kelda: FDM / Motor

út at koyra

RAV4 – n‡ggjur frítí›arbilur frá Toyota

Bilurin er smartur innan, vi› instrumentum vi› hvítari bakgrund, le›urrætt og silvurgrá panelir og kontaktir

Hesin RAV4 er tann styttri vi› 3 hur›um

MAGNUS GUNNARSSON

Tá Toyota í 1994 fyrstu fer› komu á markna›in vi› RAV4, løgdu teir grundstø›i undir einum heilt n‡ggjum bilklassa, SUV (Sport Utility Vehicle), i› var› væl móttikin og spreiddi seg um allan heimin.

Tvær støddir

Brúkara kanningar hava víst, at fólk velja hesar bilar meira eftir tí útsjónd og koyrieginleikum teir hava, enn orsaka av off-road eginleikunum. Tí hevur Toyota gjørt RAV4 vi› tveimum møguleikum, trekk á framhjólunum ella f‡rahjólstrekk. Ì bá›um útgávunum er møguleiki fyri at velja ímillum ein stuttan sportligan bil vi› 3 hur›um, og ein stóran og elegantan bil vi› 5 hur›um. At síggja til er RAV4 nógv broyttur, í mun til forgangaran.

Væl ljó›doyvdur

N‡ggjasta útgávan av RAV4 hevur hvørki reduktiónsgear ella sperru, so hann er ikki beinlei›is gjørdur til at koyra í haganum vi›, hóast hann klárar seg væl. Koyrieginleikarnir eru sum á einum persónbili, bert ta› at man situr hægri, og úts‡ni harvi› betur. Ljó›doyvingin er betra› vi› 50 %. Bilurin er smartur innan, vi› instrumentum vi› hvítari bakgrund, le›urrætt og silvurgrá panelir og kontaktir. Hann er líka arbei›svinarligur sum ein MPV.

Diesel næsta ár

Motorurin er ein 2.0 litur VVTi vi› 150 hk. Annars er ta› solei›is at teir sum einans hava trekk á frammhjólunum hava ein 1.8 litur motor vi› 125 hk.

RAV4 ver›ur eisini seldur sum vøruvognur, og um eitt ár kemur hann vi› einum common rail dieselmotori.

Kabinan trygg

RAV4 hevur ABS bremsur vi› EBD (Elektronic Brakeforce Distribution), kabinan er bygd sum eitt trygdarbúr, har taki› og hur›astólparnir hava stoytdoyvandi lamellir, sum verja tey fer›andi um bilurin bóltar runt. Eisini eru trygdarbjálkar í hur›unum og forsetrini hava WIL (Whiplash Injury lessening). Standard útger›in er m.a. fjarst‡rt sentrallás, el-sí›urútar framman, el-sí›u-spegl v/varma, elektroniska startsperru og tokulyktir framman.

Sum á øllum Toyota bilum er 3 ára garanti og 12 árs garanti móti gjøgnumtering. Opi› hús ver›ur í bilhøllini hjá Reyni Service í Hoyvík, leygardagin 30. september frá kl. 10.00 til 15.00.

Toyota RAV4

Motorurin	2.0VVTi bensin vi› 150 hk	
0-100 km/t	10,6 sek.	
Bensinn‡tsla	11,4 km/l	
Dekkstødd	215/70-16	
Stødd og vekt	3 hur›ar	5 hur›ar
Longd	380,5 cm	420,0 cm
Breidd	173,5 cm	173,5 cm
Hædd	166,5 cm	168,0 cm
Eginvekt	1225 kg	1275 kg
Totalvekt	1700 kg	1825 kg
Prísir	kr. 239.600,-	kr. 254.600,-
Søluumbo›	Reyni Service Vegurin Langi FO-188 Hoyvík Tlf. 313040	